# Sigursleysir í 9 dystum



*Danilo Kovacevic leggur B71 á odda í Gundadali*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VODAFONEDEILDIN** B36 sat á øllum í fyrra hálvleiki, men teir punkteraðu ikki dystin tá. Í seinna hálvleiki mundu sandoyingar farið við øllum

Heri Simonsen

| | |
|---|---|
| B36 | 1 |
| B71 | 1 |

Tað gongur av skriðuni hjá B36. Seinastu níggju dystirnar í vodafonedeildini eru teir farnir av vøllinum við ongum ella bert einum stigi, og er tað ein stór andsøgn at fáa bert seks stig í níggju dystum, tá liðið fekk níggju stig í trimum teimum fyrstu dystunum. Aftur ígjár høvdu teir hvítu nóg mikið av málmøguleikum til at vinna dystin. Dysturin var ikki nógv meiri enn byrjaður so rakti Hjalgrím Elttør yvirliggjaran, beint aftaná var Magnus Olsen ógvuliga nær við, og Hjalgrím gjørdist púra leysur, men hann skeyt bóltin á Predrag Markovic í B71-málinum. B71 ressaðist til uppgávuna í seinna hálvleiki, og tá komu teir eisini til góðar málmøguleikar. Fyrst stórbjargaði Jóan Pauli Jacobsen einari atsókn frá Ebba Kristin Thomsen. Løtu seinni setur Símun Hansen Odmar av í høgru síðu, har hann við einari góðari sending finnur Danilo Kovacevic, sum bert nýtist at seta fótin á og B71 var á sigurskós. Nú sá svart út hjá, men tað eydnaðist árstalsfelagnum at bjarga sær tað eina stigið. Høgni Eysturoy var spældur fríur í einum yvirlappi. Høgni legði so bóltin uppá tvørs til Heina í Skorini, sum hegnisliga setti innaru síðu á, og so stóð aftur á jøvnum.

**Báðir partar iðraðu seg**

Jóan Pauli Jacobsen og Jóhan Ellingsgaard hjá B36 iðraðu seg aftaná dystin, serliga um allar teir misnýttu málmøguleikarnar í fyrra hálvleiki, sum burdu givið B36 eina



*Fagnaður á Danilo og B71-leikarunum eftir leislumálið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

trygga leiðslu, áðrenn steðgin. Símun Hansen og Ebbe Kristin Thomsen viðgingu, at teir í B71 vóru í ringum skørum í fyrra hálvleiki, men at B71 átti at bundið fyri og tikið øll trý stigini suður við sær um Skopunarfjørð, tá teir vóru komnir á odda, tí teir stóðu seg væl, aftaná uppsangin hjá Piotr Krakowski í steðginum. Símun Hansen fekk tvey gul kort, og verður hann tí ikki tøkur til heimadystin ímóti ÍF leygardagin.

*heris@sosialurin.fo*




*Christian Høgni Jacobsen, sum er toppskjútti í Vodafonedeildini, hevði ikki skoraði í fýra dystum á rað, tá tað aftur mikukvøldið eydnaðist honum at fáa tvey týðandi mál fyri NSÍ ímóti Víkingi*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Nummar átta...

**VODAFONEDEILDIN** Metrøðin hjá NSÍ helt fram í Sarpugerði mikukvøldið, tá áttandi sigurin á rað varð fingin til høldar ímóti Víkingi, ið sær út til at vera í kreppu fyri tíðina

Hilmar Jan Hansen

| | |
|---|---|
| Víkingur | 2 |
| NSÍ | 3 |

– Eg eri sera glaður fyri, at eg fekk hol á aftur málskjótingina. Av teimum fyrstu níggju málunum, vit fingu, skjeyt eg tey átta, men síðani hevur staðið fast. Tíbetur skutu hinir málini, sum skuldu til, so vit fingu allíkavæl tað, vit skuldu hava.

Tað segði toppskjúttin, Christian Høgni Jacobsen, eftir dystin ímóti Víkingi mikukvøldið, tá hann við tveimum málum fekk endað málturkin hjá sær, samstundis sum NSÍ vann áttandu ferð á rað og tískil hevur tikið oddasessin frá HB. Og júst tey bæði liðini møtast við Løkin í Runavík í morgin.

– Tað verður ein stórdystur, sum óivað verður spennandi. Vit gleða okkum til at taka ímóti HB, og av tí at hetta er stevnudystur, verður helst nógv fólk til dystin eisini, sigur Christian Høgni.

NSÍ kom tíðliga á odda í dystinum í Sarpugerði, tá Klæmint A. Olsen við høvdinum stýrdi einum innkasti í mál, men mitt í fyrra hálvleiki javnaði Sølvi Vatnhamar fyri Víking, somuleiðis við einum skallara. Men 10 minuttir fyri hálvleik var Christian Høgni á blettinum fyrru ferðina, eftir at NSÍ við fleiri

> **Teir komu fullir av sjálvsáliti til Gøtu, meðan vit eru meira krúpandi**
>
> NICLAS NICLASEN, VÍKINGUR

sendingum hevði spælt verjuna hjá Víkingi sundur og saman inni í brotsteiginum.

**Frustrerandi**

Ta longu fyrstu løtuna av seinna hálvleiki kundi NSÍ saktans fingið fleiri mál og avgjørt dystin, men í staðin kom Víkingur so líðandi meira við og kom við einum sjálvmáli upp á javnleik, tá smáir 10 minuttir vóru eftir. Men fimm minuttir fyri tíð streyk Heðin av Lakjuni avstað og sendi innfyri til Christian Høgna, sum tryggur staðfesti 3-2 sigurin hjá teimum gulu.

– Vit noyðast bara at viðurkenna, at vit eru at kalla í kreppu. At vit ikki hava vunnið í ein mánað ella meira, er ræðuligt, men so mugu vit bara royna at hála okkum uppaftur. Tað fara vit eisini at gera, so nú gleða vit okkum til at spæla ímóti EB/Streymi við Margáir sunnudagin, sigur liðformaðurin hjá Víkingi, Niclas Niclassen, sum heldur, at dysturin ímóti NSÍ var ikki sørt merktur av, at liðini høvdu ymsar fortreytir, nú tey møttust.

– Teir komu fullir av sjálvsáliti til Gøtu, meðan vit eru meira krúpandi fyri tíðina. Tað sæst aftur á spælinum, tí teir skora upp á lítið og lætt, meðan vit skulu arbeiða øgiliga hart, bara fyri at halda málið reint og at fáa mál. Og sjálvt um vit berja okkum upp á javnt, so vit kunnu fáa eitt stig aftur, klára vit ikki at halda tað, og tað er øgiliga frustrerandi, heldur Niclas.

*hilmarjans@sosialurin.fo*